P/F THOR

**Søkt verður eftir**

## maskinmeistara/ motorpassara

**til eitt av skipum okkara**

**Starvið:**
Er eitt avloysara starv, men møguleiki er fyri føstum starvi.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubrævsum maskimeistari/motorpassari
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið (ikki treyt, men fyrimunur)
- Roykkavara/sløkki skeið (ikki treyt, men fyrimunur)

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 422503, ella skrivliga til felagið.

Umsóknin skal vera okkum í hendi skjótast tilber ella í seinasta lagi 24.03.2000.

**P/F THOR**
420 Hósvík • www.thor.fo

P/f Thor er eitt partafelag, sum rekur 6 skip, 3 av teimum eru í løtuni í Off-shore vinnuni og 3 í fiskivinnuni.

## Økisfundirnir hjá JAVNA

Økisfundirnir hjá Javna 2000 verða hildnir kring landið tann 20. mars 2000.

Økisfundirnir hava hvørt ár eitt felags heiti, og í ár er tað: »**Er stuðulsskipanin nøktandi« fyri foreldur, fyri brúkaran, fyri stuðulin, umsitingarliga og fyri politikkaran.**

Fundirnir verða skipaðir sum pallborð við orðaskifti omaná, og verða teir á hesum støðum:

**Í Havn:** á Hotel Hafnia
**Í Klaksvík:** á Sjómansheiminum
**Í Eysturoy:** í Auluni í Gøtu skúla
**Í Norðstreymoy:** í Matarhøllini í Kollafjarða skúla
**Í Vágum:** í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági
**Í Suðuroynni:** Fundurin er útsettur.

Fundirnir byrja allastaðni stundisliga klokkan 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

JAVNI

**HEIMARØKTIN**
Sigmundargøta 5 · Tlf. 317240 · Fax 319238
100 Tórshavn

## Summarfrítíðaravloysarar

Søkt verður eftir **avloysarum fyri heimasjúkrasystrar og heimahjálparar** frá 1. juni til 31. august 2000 ella eftir avtalu.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir saman við neyðugum skjølum skulu vera økisleiðarunum í hendi seinast 15. apríl 2000, og sendast til:**

**Øki 1. Suðurstreym**
Skálatrøð 14, Boks 1248, 110 Tórshavn
att: økisleiðari Anna Maria Oskarsson.

**Øki 2. Norðstreym/Vágoy**
Heilsumiðstøðin, 370 Miðvágur
att: økisleiðari Sonja Klein

**Øki 3. Eysturoy**
Heilsumiðstøðin, 620 Runavík
att: økisleiðari Ása Hanusson

**Øki 4. Norðuroyggjar**
Bøgøta 34, 700 Klaksvík
att: økisleiðari Elsba Lützen

**Øki 5. Suðuroy**
Heimarøktin, 900 Vágur
att: Jeanna á Lágabø

**Øki 6. Sandoy**
Áargarður, 210 Sandur
att: økisleiðari Ida Sørensen

**Heimarøktin**

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Heimarøktin í Suðurstreymoy

**Heimasjúkrasystrastarv:**
Í Heimarøktini í Suðurstreymoy verður eitt starv sum heimasjúkrasystir leyst til setan frá 1. apríl 2000 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er í skiftandi vaktum uppá fulla tíð.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Anna Maria Oskarsson, økisleiðara tlf. 317249

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 31. mars 2000 kl. 14.00

Frá

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

## Lýsti aðalfundurin

verður **mánakvøldið 20. mars kl. 20** í hølum Starvsmannafelagsins, J. H. Schrøtersgøta 9.

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin verður limafundur um býráðsarbeiði og komandi býráðsval. Býráðslimirnir vera við á fundinum.

**Nevndin**

## Søkt verður eftir

álítandi og sjálvstøðugum timburmonnum til arbeiði í Noreg at byrja beinanvegin. Góð løn + akkord.

**Sp/f FK-smíð**
**Tlf. 284010 ella 004797090510**

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Heimarøktin í Suðuroy

**Heimasjúkrasystrastarv:**
Í samband við at vit byrja uppá skipaða kvøldrøkt í øki 5, Suðuroy, verður søkt eftir heimasjúkrasystrum at arbeiða í skiftandi vaktum frá 1.apríl 2000 ella eftir nærri avtalu.

Tað verða 2 størv á 24 tímar í norðaru helvt, og 2 størv á 24 tímar í sunnaru helvt.

**Lønar - og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara tlf. 373907.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 31. mars 2000 kl. 14.00



FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

## Lærlingur til Fíggjarmálastýrið

Søkt verður eftir einum lærlingi til Fíggjarmálastýrið. Arbeiðsøkið er sjálvt Fíggjarmálastýrið.

**Í Fíggjarmálastýrinum verður arbeitt við:**

- Játtanarskipan landsins
- Fíggjarlóg og øðrum játtanarlógum
- Kapitalmarknaðarviðurskiftum
- Búskaparanalysum
- Búskaparmodellum
- Toll-, skatta-, og mvg-lógarfyrireiking

**Starvið fevnir um:**
Sum lærlingur kemur tú at fáast við alt vanligt skrivstovuarbeiði umframt journalisering við nútímans framkomnari útgerð.

**Førleiki:**
Vit hava hugsað okkum, at tú
- hevur FHS, HH, ella líknandi prógv
- hevur lætt við at samstarva
- hevur lætt við at málbera teg bæði skrivliga og munnliga
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur telduførleika
- hevur góðan røkjuskap

Fíggjarmálastýrið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, Hagstovu Føroya og Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum. Talan er sostatt um eitt stórt og spennandi arbeiðsumhvørvi.

**Setunartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**
Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send til:

**Fíggjarmálastýrið**
**Traðagøta 39**
**Postboks 2039**
**FO-165 Argir**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2000 kl. 12.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú ringja til Borgarhjørt Kragesteen, deildarskrivara á tlf. 35 20 20.

Hóskvøldið 16. og leygarkvøldið 18.
EIVØR PÁLLSDÓTTIR KVARTETT
Fríggjakvøldið 17.
SHALDER GEO
CAFÉ NATÚR

Sosialurin - 311820

**Sløkki- og neyðútgerð**

- Brannslangir
- Slanguvognar
- Eldsløkkjarar
- Brannteppir
- Forbindsskáp
- Børir

*Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.*

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

## Roknskaparleiðari

***Søkt verður eftir leiðara til búskapar- og roknskapardeildina í P/F FØROYA BANKA***

***Bankin***
FØROYA BANKI hevur havt stóran búskaparligan vøkstur tey seinastu árini. Samlaði javni bankans er 5 mia. kr., og eginpeningurin er 1,1 mia. kr.

***Starvið***
Roknskaparleiðarin hevur ábyrgdina av:
- deildarroknskapi og fíggjarætlan
- at gera mánaðarjavnar
- at uppseta perioduroknskapir
- at framleggja ársroknskap
- fráboðanum til myndugleikarnar
- at gera búskaparligar útrokningar og kostnaðargreiningar

***Førleikakrøv***
Tað er ein fyritreyt, at roknskaparleiðarin hevur praktiskar royndir innan roknskaparøkið gjarna saman við útbúgving frá handilsháskúla ella líknandi.

***Treytir***
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Starvið skal setast 1. mai 2000, men bíðað verður gjarna eftir rætta umsøkjaranum.

***Umsókn***
Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum verður í seinasta lagi 24. mars 2000 at senda

Jørn Astrup Hansen, bankastjóra
P/F FØROYA BANKI
Húsagøta 3
FO-100 Tórshavn

har nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Johan Djurhuus ella Jørn Astrup Hansen á telefon 31 13 50.

FØROYA BANKI

## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

☎ 212380

## Aðalfundur

verður á Hotel Hafnia, hósdagin 13. apríl 2000 kl. 19. Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot um valevni skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 6. apríl 2000.

JAVNI

## Heimahjálparafelag Føroya

lýsir til ársaðalfund í Havnar Klubba leygardagin tann 8. apríl kl. 13.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## HITT KONSERT OG DANSUR




**Fríggjakvøldið 31. mars**
**í Badmintonhøllini í Tórshavn**

**Leygarkvøldið 1. apríl**
**í Ítróttarhøllini í Runavík**

**Tey kendu hittini hjá Moirae, Terja og Føstufressum, Frændum, Eyðun Nolsøe Band og Eyðun & Terja verða spæld.**

**Kl. 23.00-03.45 • Kr. 100,-**

Sosialurin - 311820

**Lesið sosialin**